LM-068/2022

fylgiskjal 9

JARÐFEINGI

Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Gongin 7

FO-100 Tórshavn

Tórshavn, tann 19. januar 2022

Mál: 21/00050

Viðgjørt: LM

Tygara skriv: 21/0226-12

Hoyringarsvar til:

Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd (Náttúruverndarlógin).

Uppskot til løgtingslóg, sum kann betra náttúruvernd í Føroyum, hevur verið ávegis leingi. Í hesum nýggja uppskoti býta vit merki í, at uppskotið við broytingum í stóran mun er tað sama sum sokallaða Náttúrumargfeldislógin. Einstakir partar av fyrra lógaruppskotinum eru dotnir burtur ella fluttir. Lógin fylgir tó framvegis í stóran mun norsku lógini um naturmangfold.

Stórur tørvur er á eini lóg, sum kann vera við til at menna eina vælvirkandi náttúrufyrisiting. Sum heild má sigast, at broytingarnar sum eru gjørdar í mun til uppskotið um Náttúrumargfeldislógina tykjast at káma endamálið við lógini, heldur enn at styrkja hana.

Endamálsorðing tosar nú um "at røkja margfeldið" heldur enn "at røkja tað lívfrøðiliga, landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldið", soleiðis sum stóð í uppskotinum til Náttúrumargfeldislógina. Margfeldið soleiðis sum tað stendur í løtuni, er óítøkiligt. Eftirsum orðini náttúrumargfeldið, lívmargfeldið, landslagsmargfeldið og jarðfrøðimargfeldið verða nevnd í §3, stk 6, mugu vit ganga útfrá at margfeldið sipar til náttúrumargfeldið, sum fevnir um lívmargfeldi, landslagsmargfeldi og jarðfrøðimargfeldi. Tað er spell at lógin á henda hátt er vorðin óítøkilig.

Kapittul 2 í tí gamla uppskotinum "**Almennar ásetingar um burðardygt brúk**" er tikið burtur og nakað er flættað uppí kapittul 1. Úrslitið er, at nógvar ásetingar um dygd, vitanargrundarlag og fyrisitingarmið hvørva. Tað styrkir ikki lógina.

Fyrra lógaruppskotið hevði eina stutta § 20 um *Ferðslu uttangarð*. Í nýggja lógaruppskotinum er hetta ikki nevnt. Her eru nógvir spurningar um ferðing uttangarðs, sum eiga at verða viðgjørdir og sum mangla í nýggja lógaruppskotinum.

§21 lýsir landslagsverndarøkir. Landslagsverndarøkir kunnu verjast, sum hava vistfrøðiligt, mentanarligt ella upplivingarligt virði ella eru samleikaskapandi. Vit sakna, at landslagsverndarøkir eisini kunnu verjast orsaka av landslagsliga og jarðfrøðiliga virðinum. Á enskum verður hetta m.a. nevnt "geoheritage". Hugtakið og friðingar av hesum ávum eru í stórari menning júst í Noreg. Møguliga hjálpt av norsku naturmangfoldsloven. Hetta er kanska eitt av mongum dømum um, at endamálsorðingin til lógina "at røkja margfeldið", gerst óítøkilig. Ein føroysk náttúruverndarlóg hevur møguleika til at skapa somu menning, um hugtøkini landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldið verða nevnd í lógini.

Lendisspell og jarðriv (erosión) verða ikki nevnd í lógaruppskotinum, og hetta er ein stórur mangul við lógini eins og við uppskotinum til Náttúrumargfeldislógina. Trupulleikin við lendisspelli er álvarsamur í Føroyum, men hevur verið skúgvaður til viks í mong ár.

Fráboðanarskylda. Lógin gevur heimild til árinskanningar í sambandi við verkætlanir, men eins og í fornminnalóggávuni kundi Náttúruverndarlógin havt fráboðanarskyldu. Tað vildi álagt t.d. byggiharrum fráboðanarskyldu, um komið verður fram á nakað, sum hevur týdning fyri náttúrumargfeldið og vitan um hetta. Tá kann náttúrufyrisitingin skráseta fráboðanina og tikið støðu til, um kanningar skulu setast í verk. Henda tørv síggja vit ofta í sambandi við gerð av vegum og tunlum og øðrum stórum byggiætlanum.

Tøka av gróti til grótgarðar. Skaði hendir í løtuni á økir, har nógv hagagrót verður tikið til grótgarðar og aðra grótlaðing. Tá tað ikki verður ansað eftir um slík tøka er burðardygg, er vandi fyri, at erosiónin økist munandi. Hesin trupulleikin kundi verið reguleraður við náttúruverndarlógini.

Tøka av mineralum. Lógin nevnir ymiskt um tøku av djórum og plantur, men einki um tøku av steinsløgum/mineralum. Hetta hevði verið natúrligt at tikið við í sambandi við at verja náttúrumargfeldið.

Vinalig heilsan

Lis Mortensen
Verkætlanarleiðari
Jarðfeingi
Lis.mortensen@jardfeingi.fo
Tlf 223244